FØROYA REIÐARAFELAG

Tórshavn, 21. nov. 2023

Hoyringarskriv til fíggjarnevndina ísv. broyting í lóg um toll og lóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi.

Fíggjarnevndin hevur kallað Føroya Reiðarafelag til hoyring í samband við tvey lógaruppskot, ið snúgva seg um broytingar í løgtingslóg um toll og løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi. Samanumtikið hava uppskotini til endamáls at minka um føroyska útlátið av vakstrarhúsgassum umframt at fáa til vega inntøkur til landið. Talan er um týðandi broytingar fyri tey skip, sum nýta ymisk sløg av HFC-gassum, sum nú gerast munandi meira kostnaðarmikil.

Reiðarafelagið ásannar, at ávís sløg av f-gassi ikki kunnu nýtast um nøkur ár sum liður í einum altjóða veðurlagspolitikki. Tó eigur løgtingið at taka atlit til tey skip, sum nýta hesi sløg av gassi, soleiðis at tey fáa eitt rímiligt skotbrá til at leggja um. Harumframt eiga hesi skip ikki at verða revsað, meðan hetta slagið av gassi so líðandi verður útfasað. Talan er um stórar íløgur í nýggjar køli- og frystiskipanir ella íløgur í nýggj skip, sum standa fyri framman. Hetta uppskot rakar mest tey skip, sum frammanundan hava tungan rakstur, og tískil er neyðugt at fara fram við varsemi.

Um støðið verður tikið í einum verksmiðjutrolara við einum lutfalsliga stórum anleggi, sum nýtir R507, er greitt, at hetta kann gerast ein avbjóðing. Um hesin nýtir umleið 2.500 kg. um árið, so er talan í dag um ein kostnað uppá uml. 375.000 krónur (150 kr. pr. kg.). Ætlanin í hesum uppskoti er at áleggja eitt avgjald uppá 558 kr. pr. kg. omaná verandi søluprís. Tað merkir, at kostnaðurin eftir broytingarnar verður uml. 1,8 mió. kr. Hetta er tískil ein stórur eykakostnaður fyri eitt slíkt skip.

Hjá einum frystilínuskipi við eini frystiskipan við 1.500 kg. av R507, kann tað lættliga kosta væl meira enn eina millión krónur at fylla skipanina eftir ein leka. Um støði verður tikið í eini skipan, sum tekur 1.200 kg, og hendan skipan skal hava 200kg av R507 um árið, verður talan um ein meirkostnað uppá umleið 110.000 krónur fyri eitt reiðarí. Skip eiga sjálvsagt at leggja doyðin á, at nýta so lítið av f-gassi sum gjørligt, men tað kann vera ein dyggur smeitur fíggjarliga at fylla eina slíka skipan.

Hetta eru hóvligar metingar viðvíkjandi prísinum, tí summi vænta, at prísurin hækkar munandi meira enn avgjaldið. Talan kann tískil gerast um ein stóran meirkostnað. Sigast skal, at nýggjar og nýliga umvældar skipanir vanliga ikki eru eins dýrar í rakstri sum eldri skipanir.

Nýggja kunngerðin um f-gass ásetir, at frá 1. januar 2027 er ikki loyvt at nýta nýframleitt f-gass við GWP-virði størri enn 2.500, tó við undantaki av heilt smáum áfyllingum. Frá 1. januar 2030 er ikki loyvt at fylla nýframleitt f-gass við GWP-virði størri enn 2.500 á køli- og frystiskipanir yvirhøvur. Frá 1. januar 2036 er ikki loyvt at nýta f-gass yvirhøvur.

Tískil er ein ætlan løgd fyri, hvussu hetta slagið av gassi verður útfasað, og óneyðugt er tí við avgjøldum. Hetta er longu ein stór avbjóðing fyri fleiri skip, og løgtingið eigur ikki at leggja óneyðugar byrðar á tey.

Hesi avgjøld skulu eftir ætlan fíggja umleið 10-15 mió. kr. av skattalættanum hjá landsstýrinum. Talan er tó ikki um nakra langtíðarfígging, tí at hesar inntøkur fella burtur, tá ið gassið verður fasað út. Í sínum

Boks 361 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 73 99 12 • Teldupostur: stefan@industry.fo

viðmerkingum vísir Fíggjarmálaráðið aftur, at talan bara er um at fáa til vega inntøkur til landið. Í skjalinum um skattaumskipan stendur tó beinleiðis, at ein inntøkukelda til hesa skattaumskipan er at leggja avgjald á f-gass. Í øllum førum er greitt, at eitt týðandi endamál við hesi lóg er at fáa inntøkur til at fíggja ein skattalætta. Hetta átti at staðið greitt í viðmerkingunum til lógaruppskotið.

Undir hesum umstøðum eigur landið ikki leggja eyka byrðar á fiskiskip, tá ið gassið skal fasast út kortini. Hesa inntøku eigur landið ikki taka inn frá vinnuni. Heldur eigur vinnan at varðveita peningin at nýta til útskifting av køli- og frystiskipanum ella at keypa nýggj skip, ið ikki nýta f-gass.

Føroya Reiðarafelag mælir til, at avgjald ikki verður lagt á hesi sløg av gassi, men at reiðaríini heldur varðveita peningin til at gera tær neyðugu íløgurnar, sum skulu gerast, áðrenn f-gass eru útfasað.

Vinarliga,

Stefan í Skorini, stjóri

Føroya Reiðarafelag